# Starvsmannafelagið stríðst í hálva øld


*Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum*

**Í dag hátíðarheldur Starvsmannafelagið sín 50 ára stovningardag. Felagið fór undir sítt virksemi sum sjálvstøðugt felag tann 23. februar í 1961. Frá 1948 vóru starvsfólk og tænastufólk hjá landinum í sama fakfelag, ið eisini kallaðist Starvsmannafelagið, men hetta felagið fór í tvíningar í 1961, tá starvsfólk og tænastumenn stovnaðu hvør sítt felag. Í dag eru 2200 limir í Starvsmannafelagnum**

Uni Arge

Mangan hava oddafólk í felagnum gjørt vart við áhugamál felagsins í fjølmiðlunum, og meira enn so hevur felagið verið í verkfalli, so almenn arbeiðspláss hava ligið púra lamin. Tiltikið er verkfallið vorðið, tá limirnir í Starvsmannafelagnum skipaðu fyri blokadu í Fíggjarmálaráðnum á Argjum, meðan Karsten Hansen var landsstýrismaður við fíggjarmálum. Ikki minni tiltikin er útsøgnin hjá Karsteni Hansen á kaiini í Leirvík, tá hann hann speiskliga hevði at øllum hesum blokerandi fólkunum, sum gingu og mólu millum húsini í Havn.

Flent hevur mangan verið at hesi útsøgn, tí hon var júst ein speisk við-merking um, at limirnir í Starvsmannafelagnum eru ikki júst tílíkir, sum hvønn dag standa upp ímóti hvøssum landnyrðingi og draga línu ella banka ís á fjarleiðum. Starvsmannafelagið er, sum navnið sigur, felagið hjá starvsfólkum á almennum stovnum og fyritøkum, og felagið er bæði stórt og sterkt. Felagið hevur eitt nú stásilig hølir og væl skipaða umsiting, og røddin hjá felagnum í almenna rúminum er sterk. Ótaldar ferðir hava oddafólk í felagnum sett daggskránna í fjølmiðlunum.

## Felag klovnaði

Søgan hjá Starvsmannafelagnum byrjar við, at heimastýrislógin verður sett í gildi í 1948. Tá gingu starvsfólk og tænastumenn hjá landinum saman í felag, ið eisini nevndist Starvsmannafelagið. Á sumri í 1960 fór felagið so í verkfall, tí báðir starvsbólkarnir vóru ónøgdur við síni viðurskifti. Verkfallið var hart. Býráðið í Havn hótti við at senda fólk til hús, um tey ikki komu til arbeiðis, so tey møttu skjótt aftur. Landsstýrið helt verkfallið vera ólógligt og hótti eisini við at senda fólk til hús. At enda varð semja gjørd millum partarnar, og verkfallið endaði.

Burtur úr verkfallinum komu lyfti frá landsstýrinum um ábøtur fyri báðar yrkisbólkarnar, men greitt var eftir verkfallið, at starvsfólk og tænastumenn høvdu so ymisk áhugamál, at tey vóru betur skipað í hvør sínari deild í felagnum. Tosað varð um at skipa eitt Meginfelag Starvs- og Tænastumanna við einari deild fyri starvsfólk og einari fyri tænastumenn. Málið varð tikið upp á aðalfundi 8. februar í 1961, men onki kom burturúr. Tá limirnir aftur møttu tann 16. februar, høvdu bæði starvsfólk og tænastumenn valt nevndir at umboða hvør sín yrkisbólk.

Við hesum var felagið í roynd og veru farið í tvíningar, og tá aðalfundurin varð tikin uppaftur 23. februar, varð skilnaðurin staðfestur. Samstundis varð staðfest, at bæði feløgini vóru limir í Meginfelag Starvs- og Tænastumanna, ið skuldi taka sær av felags áhugamálum hjá feløgunum báðum. Hetta felagið var virkið eina tíð, men helt so uppat.

## Fakta

**Starvsmannafelagið varð stovnað 23. februar í 1961**

**Umleið 100 limir vóru í felagnum tá. Nú eru teir 2200**

**Limir í Starvsmannafelgnum eru starvsfólk í umsiting, stovnum og feløgum hjá landi og kommunum**

**Forkvinna í felagnum í dag er Selma Ellingsgaard**

**Hinir formenninir hava verið: Erling Djurhuus, Niclas Andrassen, Jógvan Jensen, Hans Thomsen, Ásbjørn Midjord, Atli Klein Olsen, Ernst Hansen, Andrass Skaalum, Erhard Jacobsen, Hartvig Hansen, Jákup Danielsen og Gunnleivur Dalsgarð**

Starvsmannafelagið føddist sostatt burtur úr einum klovningi á almenna arbeiðsmarknaðinum, men fekk væl burturúr, tí lønarvøksturin á heysti í 1961 var góð 50 prosent í meðal sammett við árið frammanundan.

## Stríðið heldur fram

Forkvinna í Starvsmannafelagnum í dag er Selma Ellingsgaard. Hon tók við eftir Gunnleiv Dalsgarð, sum í fleiri ár var rættiliga sjónligur á almenna pallinum. Aðrir formenn í nýggjari tíð hava verið Erhard Jacobsen, Jákup Danielsen og Ernst Hansen. At mong kenna bæði verandi forkvinnu og fyrrverandi formenn sigur kanska alt um, hvussu sjónligt Starvsmannafelagið er. Tað er sum oljubilurin í grannalagnum. Hann er ikki altíð har, men altíð onkuntíð. Í sambandi við 50 ára stovningardagin fegnast Selma Ellingsgaard eisini um sigrarnar, ið Starvsmannafelagið hevur vunnið.

Handan hvønn einasta sigur, sum vunnin er, liggur tógvið stríð, samráðingar, samstarv og tíverri eisini lemjandi verkføll, vísir hon á í skrivi til fjølmiðlarnar. Enn sum áður er bulurin í felagnum limirnir, og álitið eru álitisfólkini, sum røkja uppgávuna sum bindilið millum leiðslur, limir og felag. Á rókini sita so nevndin og umsitingin og útinna viljan hjá limunum. Og júst soleiðis eigur tað at vera, heldur forkvinnan. Hon heldur 50 ára dagin vera eitt gylt høvi at líta aftur um bak og stinga nýggjar leiðir út í kortið. Og komið er ikki á mál, staðfestir hon.

– Menningin í føroyska samfelagnum og í almennu umsitingini hevur verið stór hesi fimmti árini, felagið hevur virkað. Nútíðin krevur, at vit alla tíðina laga og fyrireika okkum til framtíðar avbjóðingar, har kappingin við umheimin herðist í hvørjum. Her eiga vit ikki at gloyma siðbundnu stríðsøkini løn og arbeiðstíð, men eisini virka fyri trygd og trivnaði, støðugari førleikamenning og smidligari lønarskipanum. Sum árini eru liðin, eru alsamt fleiri fakfeløg komin upp í Starvsmannafelagið. Tí er felagið í dag meiri eitt fakfelagssamtak enn eitt vanligt fakfelag, og margfeldið og støðdin eru okkara styrki, sigur Selma Ellingsgaard.